## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útnyrðingi, um kvøldið minkar hann vindin. Ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Fleyr til gul av ymsum ættum, turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 13 og 16 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og eitt skifti regn, annars támut veður ella mjørki. Hitin millum 13 og 16 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Lot til andøvsgul av eystri, týsdagin lot av ymsum ættum. Yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 14 og 18 stig.

# Laksamenn og laksakvinnur

**Í góðveðrinum mánadagin vóru nógvir menn við tráðu at síggja við Leynarvatn. Sólin bakaði niður, so tað var hugaligt at royna eftir laksi henda seinnapartin, Sosialurin var á vitjan**

TÍÐINDI
*Hans Kárason Mikkelsen*



*Laksamenn í góðveðrinum mánadagin*
*Hans Kárason Mikkelsen*

Tað vóru einir tíggju mans at síggja við vatnið, og ein kvinna stóð eisini og fiskaði laks. Vit hildu sjálvandi beina leið móti kvinnuni við tráðuni og spurdu, um tað er vanlig sjón, at síggja konufólk við føroysku vøtnini.

– Man má royna at umboða kvinnurnar her í einari mannfólkaverð, flennir hon, meðan maður hennara við síðuna av undrandi spyr, hví hon ikki vil avmyndast av Sosialinum. Laksakvinnan er skjót at svara, at hann kann sjálvur fara í myndina. Og so sleingir hon fluguna út yvir vatnið og roynir eftir laksi.

Men enn er ongin laksur at síggja.

Longur yviri standa einir fýra mans tættir og royna saman. Teir tykjast allir at vera garvaðir fiskimenn.

– Tað er ov stilt á vatninum í dag, halda teir fýri, meðan teir hegnisliga kasta fluguna út yvir stilla vatnið.

– Brúka flest fólk flugu nú um dagarnar, spyrja vit, og teir svara, at tey allarflestu hava flugu.

– Tað munnu verða tey fægstu, ið royna við nøkrum øðrum, siga teir.

Og flugan vísir seg at geva úrslit, tí endiliga kemur ein laksur upp á turt. Tað er hjá 19-ára gamla Adrian Joensen úr Leirvík, at tað bítur á, og Adrian er ikki seinur at fáa laksin inn. – Eg havi fingið níggju laksir í seinastuni, sigur Adrian, og leggur aftrat, at hann eisini fiskaði á ólavsøku.

Spurdur um tað eru líka nógv konufólk at síggja við Leynarvatn sum á ólavsøku, svarar ungi maðurin, at tað er meira enn so, at fleiri kvinnur eru at síggja.

– Eg veit um eina 80-ára gamla damu, ið plagdi at koma nógv í fjør, sigur leirvíkingurin.

Adrian Joensen ætlar sær at standa í nakrar tímar aftrat, nú klokkan nærkast seks um kvøldið. – Eg plagi at vera fleiri tímar um dagin, tá eg eri her, sigur laksamaðurin.

Laksakvinnan longur yviri sær út til at hava tað stuttligt, meðan hon roynir at fáa fluguna at líkjast einari veruligari flugu yvir vatnið. Jú, flugan sær sera gott út, so tað munnu verða nógvir, ið bíta á hjá henni.

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | 11 |
| Nuuk | 7 |
| Qaqortoq | 10 |
| Ammassalik | 11 |
| Saint John's | 22 |
| Halifax | 24 |
| Reykjavík | 12 |
| Seyðisfjørður | 10 |
| Tórshavn | 12 |
| Lerwick | 13 |
| Aberdeen | 18 |
| London | 20 |
| Tromsø | 15 |
| Bergen | 14 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 21 |
| Keypmannah. | 19 |
| Helsinki | 20 |
| Moskva | 15 |
| Berlin | 21 |
| Warzawa | 18 |
| Kiev | 20 |
| Bukarest | 25 |
| Paris | 22 |
| Madrid | 31 |
| Róm | 31 |
| Malorca | 32 |
| Athen | 33 |
| Malta | 34 |
| Tunis | – |
| Beijing | 29 |
| New Dehli | 33 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 14 |
| New York | 30 |
| Miami | 23 |
| Los Angeles | 23 |
| Meksikobýur | 20 |
| Panama | – |
| La Paz | 14 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 20 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 985 hPa. vestan fyri Føroyar fer eystureftir og grynnist nakað. Tað gevur hvassan vind av útnyrðingi fríggjadagin.




Lágtrýstið vestan fyri Írland fer spakuliga norðureftir og hitabrúgvin haðani verður væntandi við Føroyar sunnudagin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 20/08 kl. 06⁰⁰– 21/08 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 12,3°
Minsti hiti máldur í aug.: 0,2° Mesti hiti máldur í aug.: 22,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 13,3 mm – mált frá 20/08 kl. 06⁰⁰–21/08 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í august: 48,8 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

19. august: Mánin longst frá jørðini
20. august: Seinna kvarter
27. august: Tendring

Kelda. Álmanakkin 2003

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 22. aug | 03.16 | 15.38 | 02.16 | 14.38 | 02.31 | 14.53 | 05.16 | 17.38 | 06.16 | 18.38 | 01.31 | 13.53 | 00.31 | 12.53 | 03.31 | 15.53 | 04.31 | 16.53 | 03.01 | 15.23 | 04.16 | 16.38 |
| 23. aug | 04.01 | 16.24 | 03.01 | 15.24 | 03.16 | 15.39 | 06.01 | 18.24 | 07.01 | 19.24 | 02.16 | 14.39 | 01.16 | 13.39 | 04.16 | 16.39 | 05.16 | 17.39 | 03.46 | 16.09 | 05.01 | 17.24 |
| 24. aug | 04.48 | 17.12 | 03.48 | 16.12 | 04.03 | 16.27 | 06.48 | 19.12 | 07.48 | 20.12 | 03.03 | 15.27 | 02.03 | 14.27 | 05.03 | 17.27 | 06.03 | 18.27 | 04.33 | 16.57 | 05.48 | 18.12 |
| 25. aug | 05.36 | 18.01 | 04.36 | 17.01 | 04.51 | 17.16 | 07.36 | 20.01 | 08.36 | 21.01 | 03.51 | 16.16 | 02.51 | 15.16 | 05.51 | 18.16 | 06.51 | 19.16 | 05.21 | 17.46 | 06.36 | 19.01 |

5 707265 100050 >